Fylgiskjal 4

LM-033/2023

Elsa Magnussen

Fra: Elsa Magnussen
Sendt: 9. oktober 2023 14:31
Til: Elsa Magnussen
Emne: VS: Lógaruppskotið um broyting í ll um foreldramyndugleika og samveru (ókeypis umboðan)

Fra: Eyðhild Skaalum <eydhild@advokatur.fo>
Sendt: 11. september 2023 12:15
Til: Alfred Petersen <petersen@adv.fo>
Emne: Lógaruppskotið um broyting í ll um foreldramyndugleika og samveru (ókeypis umboðan)

Góðan dag Alfred

Sjónamiðið viðvíkjandi ókeypis advokathjálp er, at tað er neyðugt, tí hesir klientar aloftast eru fólk, sum hava trupult við at átaka sær eina útreiðslu av hesum slagi afturat øllum hinum.

Tað sæst eisini td á Rætttarhjálpini, har vit fáa heilt fitt av spurningum um samveru og foreldramyndugleika.

Og tað er givið, at tað koma skjótari og betri loysnir, við at partarnir frá byrjan eru umboðaðir av advokatum. Tað eru okkara royndir.

Málini eru, ikki tær at siga, av slíkum slagi, har kenslur og ósemjur eru eyðkennini, og tað einasta rætta er tá, at tað eru onnur, enn partarnir sjálvir, sum leggja málini fram og royna at gera semjur ella fyrireika avgerð, um tað er einasti útvegur.

Prinsipielt kunnu vit, sum advokatar, bara enudrtaka, at tað er ein heldur øvug støða at seta borgararnar í, hetta við, at tá stríðið er harðnað so mikið, at rætturin er einasti útvegur, ja, so ber til at fáa ókeypis advokathjálp via fría rættrførslu, sum hesi fólk aloftast fáa.

Sami problematikkur sæst í barnaverndarmálum, har foreldur ikki fáa ókeypis hjálp, fyrr enn málini enda í Høvuðsbarnaverndini.
Tá er mangan verri at fáa skynsamar loysnir sæð í mun til, um málini altíð fingu best møguligu byrjan.

Eg ivist ikki í, at hetta hevði verið betri fyri børnini og eisini fyri foreldrini, og júst tað sama er at siga um ókeypis advokthjálpina, sum okkara politikkarar tíverri nú hava í hyggju at taka av.

Advokatfelag Føroya kann bara heita inniliga á politikkararnar um at geva borgarunum møguleika fyri at loysa hesi viðkvomu mál so skynsamt sum gjørligt, og tað er við at seta inn tíðliga við proffessionellari hjálp, og at lata borgararnar vita, at hjálp er at fáa, tá teir standa í tungum trupulleikum, sum her umrøddu.

Eg veit ikki, um Familjufyrisitingin er eitt sindur tvíbýtt í hesum spurningi, og tað, sum ørkymlar, er, at eg havi ikki enn hoyrt nakað argument fyri, hví tað skuldi verið betri at tikið ókeypis umboðanina av. Hinvegin havi eg hoyrt, at tað ger góðan mun at hava advokatar inni, sum arbeiða fyri at finna konstruktivar loysnir.

Og lógaruppskotið sigur bara, at orsøkin er fíggjarlig, og TAÐ haldi eg veruliga, at Advokatfelagið kann siga nøkur orð um, tí so kostnaðamikið er tað ikki, og og als ikki sæð í mun til allar tær avleiðingar, sum ikki kunnu mátast í peningsvirði, men sum, vit vita, er avleiðingin, tá foreldur klandrast um børn ella við myndugleikar mangan eitt heilt barnalív, sum jú ikki telur so mong ár, at stríð relativt verður høvuðsinnihaldið í lívnum hjá hesum børnum.

Er tað veruliga so kostnaðarmikið, kundi konstruktivara loysnin verið at latið nakað - eina avmarkaða upphædd – verið ein møguleika í staðin.

Eitt framkomið samfelg, sum vit elska at kalla okkum, eigur at hava civiliseraða hjálp til hesar borgarar!

Vinarliga//Sincerely

Eyðhild Skaalum
Advokatur//Attorney-at-Law

ADVOKATUR
EYÐHILD SKAALUM

Dr. Jacobsensgøta 3, 100 Tórshavn
Tlf.: 788040, teldupostur: eydhild@advokatur.fo